tíðindablaðið
# sosialurin
Nr. 44 Mikudagur 5. mars 1997 71. árgangur Kr. 7,00

Tema: 28 síður um olju


Síða 8

Búskaparfrøðingurin Sverri Hansen varð biðin um at gerast formaður í Framtaksgrunninum, og hann sigur seg hava arbeitt eftir bestu sannføring

# – Eg havi ikki leitað mær vald

## Jógvan Vágsheyg, arbeiðsgevararnir:

# Kemur ikki upp á tal at hækka lønir

– Arbeiðsfólk fáa ov lítið í løn. Men vit hava ikki ráð at gjalda meira í løn. Loysnin er skattalætti, sigur formaðurin í arbeiðsgevarafelagnum, Jógvan Vágsheyg Síða 4


– Útreiðslurnar til lønir eru ov stórar sum er, siga arbeiðsgevararnir

# Oljuráðstevnan byrjar í dag



Ráðstevnan í Norðurlandahúsinum byrjar í dag, og nógvir útlendingar eru komnir til landið. Lesið annars temablaðið í Sosialinum

SILD · SILD
Tað besta til veitsluna...
5 kg spannir
Bein- & skræðuleys
* SALTSILDAFLØK
* KRYDDSILDAFLØK
* SALT-/KRYDDSILD, heil
Fritt heimkoyrd í Havn og í Klaksvík, annars við Strandferðsluni
SILDAGOYMSLAN
Tlf. 12355 (kl. 10–15)

PRIMA
GOGGURÚSUR
Royndar í túsundatali við bestu úrslitum.

Taka móti bileggingum til næstu sending!
SILDAGOYMSLAN
Tlf. 12355 (kl. 10–15)


*Niels Helveg Petersen og fylgi á flogvøllinum í gjár*

# Danski uttanríkisráðharrin í Føroyum

## Niels Helveg Petersen, uttanríkisráðharri, kom til Føroya í gjár

EIRIKUR LINDENSKOV

Í gjár kom danski uttanríkisráðharrin, Niels Helveg Petersen til Føroya.

Hann fór til verka beinanvegin, hann kom til Havnar í gjár við tyrluni hjá Atlantsflog.

Hann fór fyrst á fund við løgmann og seinni eisini á fund við Uttanlandsnevndina.

Við uttanlandsnevndina hevur Niels Helveg Petersen tosað um ES-spurningar, um NATO-málið og uttan iva eisini um marknatrætuna við bretar.

fk

